DAGSINS MEINING

Aftur ein ivasam avgerð í SEV!

Sum vit gjørdu vart við fyrr í vikuni, so tók umboðsnevndin hjá SEV eina týðandi avgerð á fundi fríggjadagin. Nevndin samtykti at byggja út vatnorkuna í Eysturoynni. Hetta er triðja úbyggingin í Eysturoynni og byggistigið kallast - eftir verkætlanini frá 1978 - Eiði 2. Tað gongur úr Svínáum suður til Selatraðar og er ætlað til 150 mió.kr. Talan er tí um tvey týðandi viðurskifti - at byggja út vatnorkuna og gera íløgur fyri 150 mió.kr.

Lat okkum endurtaka, at í prinsippinum taka tey flestu undir við, at vit skulu leggja dent ávarandi orkukeldur. Tær eru t.d. vatn, vindmegi, alduorka og tann nýggja orkukeldan - vetni, sum íslendingar hava ment og hava roynt í bussum síðani í vár.

Nú er vatnorkuverkætlanin í samband við Eiðisverkið nógv umrødd - tugt og tanlað, vil onkur kanska vera við. Men hyggja vit avbyrgt eftir hesum byggistiginum, so fekk umboðsnevndin ikki tilfarið fyrr enn nakrar dagar undan umboðsnevndarfundinum. Tað merkir, at eftir fáum døgum skuldu nevndarlimir kunna seg um hesa stóru útbyggingina og kanska tosa við aðrar serfrøðingar enn "ta sonnu" serfrøðina í SEV.

Tað er ígjøgnum umboðsnevndina í SEV, at demokratiið í SEV skal tryggjast. Tá demokratiskar avgerðir skulu takast, skulu tær hvíla á dyggari avgerð, har allir spurningar viðvíkjandi málinum verða endavendir. Spyrjast kann, um viðgerðin hevur verið nóg dygg, tá tíðin frá framløgu til samtykt bara er ein vika ella báðar tvær? Og hava aðrir serfrøðingar verið í viðgerðini?

Vit skulu eisini minnast til, at umboðsnevndin umboðar teg og meg - okkum í teimum føroysku kommununum - og nevndin hevur ábyrgdina av, at okkara mánaðarliga gjald fyri streym verður brúkt á rættan hátt, eisini tá tað snýr seg um framtíðina. Staðfestasr kann, at tað eru rætttiliga nógvir SEV-brúkarar, sum ikki hóva mannagongdir í SEV og framferðina í hesum máli.

Men eftir demokratisku meginregluni ræður meirilutin, vil onkur siga. Víst so, men er meirilutin drigin upp á tráð? Hevur hann havt fleiri alternativ at taka stoðu til? Harafturat eru fleiri spurningar reistir seinastu tíðina. T.d eigur SEV ikki at fara longur niðan í hæddina - niðan í 300 metrar, sum FNU hevur mælt til? Harafturat hava lívfrøðingar rópt varskó, tí umhvørvisárinið er ikki nóg væl kannað!

Harafturat er spurningurin, um SEV ikki átti at bíðað, til vit fingu staðfest, hvussu nýggju vindmyllurnar í Vestmanna roynast, og hvussu nýggja vindmylluroyndin hjá SEV fer at vignast. Vit vita, at SEV hevur ikki álit á alternativum orkukeldum, m.a. tí at SEV altið skal kunna veita streym - undir øllum viðurskiftum. Men haðani og til at seta føtur í spenni móti allari nýskapan er eitt so stórt gap, um umboðsnevndin ikki eigur at kunna góðtaka í hesum tíðum, tá alternativar orkukeldur vinna alt meira fram. Latið okkum tosa ærliga og opið um hetta, latið okkum fáa eitt alment orðaskifti um tað. Betur seint enn ongantíð.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Fólksins dómur: Farvæl fullveldi!

Heðin Mortensen
valevni Sambandsfloksins í Suðurstreymoy

Sjáldan man skriftin hava staðið við so stórum bókstavum á vegginum, sum nú nýggj veljarakanning vísti væl og virðiliga, at Føroya fólk hevur fingið nóg mikið av fullveldistosinum.

Fyrst og fremst kom hetta til sjóndar við dyggu undirtøkuni til Sambandsflokkin, men so sanniliga eisini við tí ovurstóra aftur-stigi, kanningin gav Tjóðveldisflokkinum.

Ikki sørt hugstoytt at hoyra Høgna Hoydal tosa um, at nú skal arbeiðast av nýggjum, so fólkið aftur kann fáa álit á politisku skipanini. Hetta ljóðar meira innantómt nú enn tær túsund ferðirnar, hann fyrr hevur sagt tað.

Kanningin vísir greitt og týðiliga, at Føroya fólk hevur álit á politisku skipanini, tá tað velur at siga sína hjartans hugsan, so hon ikki kann misskiljast: Farvæl fullveldi!

Nú er nóg mikið av frasum og flosklum um fullveldi og sjálvberandi búskap, tí fólkið vil hava realpolitikk á føroysku dagsskránna aftur. Tað skal vera ítøkiligur politikkur og ikki tær beru staðfestingar, soleiðis sum tað hevur verið.

Eftir fimm ár við oyðimarkargongd, har alt hevur verið skrúvað upp í dreymar og ynski um, at politiski veruleikin var ein annar, enn hann veruliga var, vil veljarin hava eitt greitt útskifti í Tinganesi.

Uttan at ivast sigur triði hvør veljari í veljarakanningini, at Sambandsflokkurin nú eigur at taka við landsins leiðslu. Sagt verður fullveldinum farvæl so týðiliga, at eingin kann fara skeivur: Góðan dag, Føroyar!

5 milliónir - útreiðsla ella sparing?

Bjarki Mohr

Eru rationaliseringar stuttfreistaðar útreiðslur, ella langtíðar sparingar.

Eg sat við áhuga og lurtaði eftir tíðindasendingini kl. 18:30, týsdagin hin 16. desember 2003, har útvarpsmaðurin greiddi frá nýggju veljarakanningini. Framløgan varð áhugaverd, eins og samrøðurnar við ymisku floksformennirnar vóru tað. Men endin á tíðindasendingini varð - tíverri - mest at líkna einari gravartalu.

Útvarpsmaðurin bar fram, at um Føroya Javnaðarflokkur kom í eina komandi samgongu eftir valið, varð landskassin í vanda fyri at missa 5 milliónir eftir 3 ár, vísandi til uppskotið hjá Javnaðarflokkinum um, at miðfyrisitingin skal umskipast og tænastan til borgaran betrast.

Í uppskotinum verður lagt upp til at fremja tíðandi umskipanir innan miðfyrisitingina, herundir verður dentur lagdur á at minka talið av aðalráðum, soleiðis at vit framyvir koma at hava uml. 6 aðalráð - heldur enn tey 9, vit hava ídag - við vit meta verða meira hóskandi til føroyska samfelagið.

Niðurstøðan hjá útvarpsmanninum var, at um ætlanin skal fremjast í verki, kemur tað at kosta skattgjaldaranum uml. 5 mió., tí at vit sostatt skulu verða 3 aðalstjórar fyri uttan, og at hesir skulu hava løn komandi 3 árini.

Sjálvandi skulu hesir 3 aðalstjórar hava løn í uppsagnartíðini - um ein tílík ætlan verður framd í verki - alt annað vildi verið ómenniskjaligt og beinleiðis í stríð við gjørdar arbeiðsmarknaðar-avtalur. Men tað er eintýðuga niðurstøðan um, at talan bert er um eina útreiðslu, ið fær meg at gera hesar viðmerkingar.

Øll, ið hava verið við til at fremja umskipanir - rationaliseringar - vita, at hesar upp á stutt sikt kunnu viðføra eina útreiðslu, men at tað ikki eigur at tálma einari leiðslu í at taka neyðug stig. Um rætti hugburður er til staðar, verða tílík tiltøk alloftast sett íverk, tí at hesi skulu síggjast yvir eitt longri tíðarskeið.

Um tíðarhorisonturin hjá útvarpsmanninum - í sama dømi - rakk longur enn 3 ár, vildi hann møguliga komið til ta niðurstøðu, at uppskotið hevði sprt skattgjaldaranum somu 5 mió. yvir eitt 6 ára tíðarskeið. Hvussu stór verður sparingin, um tíðarhorisonturin gerst enn longur?

Eg eri sannførður um, at tað er neyðugt at umskipa miðfyrisitingina, soleiðis at hon hóskar til føroysk viðurskifti, og er til fyri fólkið. Øll lond hava tað - í longdini - best við, at tað er eitt hóskandi lutfall millum almenna umsiting og framleiðandi partin av samfelagnum.

Annars vil eg nýta høvi at takka Útvarp Føroya fyri nógvar góðar tíðindasendingar.

Yvirlýsing: Fosturtøka

Lívið byrjar við gitnaðinum, og eigur tí fostrið at fáa virðing og verju frá hesum degi.

Havandi í huga tær fylgjur fosturtøka hevur fyri kvinnuna bæði sálarliga og likamliga, eigur kvinnan at verða hjálpt á annan hátt.

Vit harmast um tulkingina av galdandi lóg, sum hvørki verjir barnið ella hjálpir kvinnuni.

Landsleiðslan fyri Aglow Føroyar
Elisabeth H. Joensen

Ása Lützen
Ranvá Royðutoft
Asta Lydersen
Mia av Kák Joensen

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Fíggjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Listi D = demokrati

Kenneth Rasmussen
form. Unga Sjálvstýri

Demokrati merkir fólkaræði. Demokratiið eigur at verða oman fyri partapolitisk sjónarmið og meiningar hjá einstøkum felagsskapum. Í demokratiinum liggja eisini tey rættindi og skyldur, sum hvør einstakur borgari í einum demokratiskum landi hevur. Tvs. møguleikin hjá tí einstaka at siga sína hugsan, at hava persónligt frælsi, at virka fyri at fremja sínar hugsjónir og at hava ávirkan á tað samfelag og samtíð, sum hann livir í.

Frælsi við ábyrgd
Sjálvstýrisflokkurin byggir sín politikk á sosialliberalistisku hugsjónina, sum setir demokrati sera frammarlaga, bæði tá tosað verður um demokrati sum fólkaræði og demokrati hjá tí einstaka.

At hava ávirkan merkir eisini at hava ábyrgd. Tá vit hava frælsi at siga og gera tað, sum vit vilja, eiga vit eisini at taka fylgjurnar av okkara orðum og gerðum. Hetta er ein javnvág, sum vit ikki eiga at nerta. Í 2003 síggja vit greið dømi um, bæði úti og heima, at roynt verður at avmarka og binda niður frælsi hjá tí einstaka. Tá er skjótt missa tamarhaldið, soleiðis at hetta fer sum ein sótt gjøgnum alt samfelagið og kann fáa ræðandi avleiðingar, sum eingin kann ímynda sær.

Opinleiki og alment innlit
Ein onnur síða av demokratiinum er at síggja, hvussu fólkaræði arbeiðir. Vit hava seinnu árini verið vitni til, at tað í Føroyum gongur rætta vegin. Almennir felagskapir og stovnar eru meiri opnir, og møguliga er eisini vorði minni av almennum rotinskapi.

Men enn restar nógv í. Eitt dømi, sum vit javnan verða mint á, er orkufelagið, sum vit øll eiga. Har hava orð sum opinleiki og innlit enn ikki rinið við.

Sjálvstýrisflokkurin virkar fyri, at demokratii í framtíðini fer at fáa betri livilíkindi í bæði stórum og smáum í Føroyum.

Búskaparráðið og fiskimaðurin

Svenning Borg
Vágur

Sambært formanninum í búskaparráðnum skal landsstýrið ikki óttast, at figgjarlógin gevur undirskot, tí at ov nógv alment fólk eru sett í starv og mælir hann til, at enn fleiri almenn størv verða sett, hetta mugu flestu halda vera undarliga búskaparráðgeving, tí vinnulívið klárar illanokk at føða núverandi almennu umsiting og við verandi útlitum fyri vinnuna, kemur hon als ikki at klára er bera núverandi umsiting ,so skattir og avgjøld mugu hækkast fyri at bera almennu umsitingina, verður umsitingin so enn størri, tá verður lítið eftir í lønarposanum hjá vanliga føroyinginum.

Fiskimaðurin sýnist at standa illa í eygunum á búskaparráðnum, tí at hann hevur ein skattafrádrátt, sum ger, at frádrátturin nøkulunda dekkar útreiðslurnar, sum eru við at vera sjómaður. Hettar hevur búskaparráðið fingið ilt í reyvuna av, og mæla teir til, at frádrátturin verður avtikin.

Somuleiðis ráða teir frá, at tikið verður undir við uppskotið Sambandsfloksins um, at rækjuflotin kemur undir FAS skipanina í nøkur ár fyri at bjarga honum undan húsagangi, alternativ til uppskot Sambandsfloksins hevur búskaparráðið ikki, uttan at lata flotan fara á húsagang.

Til seinast vilja teir broyta MVG lógina soleiðis, at ikki fer at bera til at vera sjálvrekandi útróðrarmaður, saman við nøkrum ungum kreftunum í Tjóðveldisflokkinum vilja teir jarðleggja útróðrarflotan, men tibetur, fullveldislandsstýrið mátti leggja frá sær í úrtíð, og var tað gott fyri fiskimannin.

Sambandsflokkurin tónar reint flagg og stendur inni fyri, at sjómenn hava skattafrádráttin og vil virka fyri at broyta MVG lógina, so tað verður lættari at reka útróðrarbátar enn tað er ídag og at reka vinnuna annars, tí tað er vinnan og bert vinnan sum føðir Føroyar, tit í búskaparráðnum

Búskaparráðið kann Føroyar verða fyri uttan, men hvat var Føroyar eitt fátækt land uttan fiskimannin.

At fiskimaðurin er lágt í metum hjá ávísum persónum hava okur ásannað, men veruleikan sleppur so ongin føroyingur og heldur ikki búskaparráðið undan, uttan fiskimannin var onki búskaparráð og heldur onki vælferðarsamfelag, men armóð og elendiheit.

Til tykur sum hava havið til arbeiðspláss, hugsið tykkum væl um, nú nýval verður, gleðilig jól og gott nýggjár og góðan fong komandi ár.

Lagnuløta

Erhard Jacobsen

Eg síggi í bløðunum í dag (16. des.), at leiðslan í Sjálvstýrisflokkinum er ónøgd við innihaldið í einum lesarabrævi, sum formaðurin í Unga Sjálvstýrinum hevur skrivað herfyri. Í lesarabrævinum leggur formaðurin í Unga Sjálvstýrinum dent á, at Sjálvstýrisflokkurin er ein veruligur miðflokkur og ikki eitt politiskt avrit av Miðflokkinum hjá Jenis av Rana og øðrum sektaristum. Eg kundi hugsað mær at lagt aftrat, at Sjálvstýrisflokkurin eigur heldur ikki at vera eitt politiskt avrit av Fólkaflokkinum, hóast tað kanska var taktiskt rætt at kasta saman við Fólkaflokkinum aftan á seinasta val. Men er tað so, at leiðslan í Sjálvstýrisflokkinum heldur, at vit skulu vera fitt og tekkjast øllum hugsandi sjónarmiðum, kanska serliga teimum, sum Miðflokkurin stendur fyri, so kann flokkurin bara avtaka seg sjálvan. Kristiligheitina hjá Miðflokkinum gevið eg í hvussu er lítið fyri.

Eina góða stevnuskrá
Sjálvstýrisflokkurin hevur eina dundrandi góða stevnuskrá, sum er eitt greitt alternativ til bæði buldrutan loysingarpolitikk og høgrapopulismu, eina stevnuskrá, sum sigur, at tað er við sjálvbjargni, við okkara egna hegni og við egnum avrikum, at vit vinna sjálvstýrið. Okkum nýtist bara at leita aftur í søguna og lesa tað, sum at sær komin sjálvstýrisfólk áður hava sagt og skrivað, og ásanna, at teirra sjónarmið hava ongantíð verið meira aktuell enn júst í dag. Men er tað so, at leiðslan í Sjálvstýrisflokkinum ikki vil fylgja síni egnu stevnuskrá, so skal hon siga tað púrasta greitt, so vit vita, hvar krossurin skal setast 20. januar.

Sjálvstýrið er ein daglig avbjóðing
Eg haldi annars at tað sæst so týðiliga í dag, hvussu stóran týdning tað hevur at hugsa seg um og vera á varðhaldi, tá ið tú situr í landsins leiðslu. Har eru nógvir traðrir at toga í, og togar tú bara í tann eina ella ongan, so er skjótt at alt fer av lagi. Og tað er júst tað, sum er um at henda, nú hendan samgongan leggur frá sær.

Skal Sjálvstýrisflokkurin hava nakra framtíð og gera sína ávirkan galdandi, má hann hava onkra ætlan fyri framtíðina, bæði tá talan er vinnu-, sosial-, útbúgvingar-, umhvørvis- og ikki minst mentunarpolitikk, sum alt eigur at byggja á sjónarmiðið um sjálvstýri. Sjálvstýrið er ein daglig avbjóðing fyri hvønn einstakan!

Í mínum eygum er onki í áður nevnda lesarabrævi, sum talar fyri eini avsannan. Lat tað vera vítt til veggja í andaligum spurningum, og latið brævskrivaran sjálvan hefta fyri tí, sum hann skrivar, serliga um tað er ósatt, sum hann sigur.

Grundsjónarmiðini og stevnuskráin hjá Sjálvstýrisflokkinum standa annars at lesa á heimasíðuni:
www.sjalvstyrisflokkurin.fo

Til Føroya Lívstrygging

Finnleif Guttesen
Tvøroyri

Ódugnaskapur á Føroya Lívstrygging, nei, tað fái eg meg illa at trúgva uppá, men hví er tað so galið, at eitt partafelag við yrkisnevnd og stjórn, ikki klárar at svara einum spurningi eftir 6 mánaðum?

Føroya Lívstrygging er eitt monopol, sum sær út til at liva av sínum kundum og ikki fyri sínar kundar. Hetta er ógvuliga harmiligt, og skuldi tað fingið avleiðingar fyri monopolið.

Í nógv harrans ár hevur umberingin hjá Føroya Lívstrygging verið, at alt gongur so seint fyri seg, tí tað verður arbeitt við at betra tað tøkniliga á telduøkinum.

Er hetta tann veruliga orsøkin til, at tað ganga 6 mánaðir uttan at ein kundi ella brúkari fær eitt svar upp á ein rímuliga greiðan spurning, ja, so er tíðin komin til at nevnd og stjórn taka avleiðingar av hesum og ikki bert lata tað fara aftur við borðinum.

Reinføri Tjóðveldisfloksins og framtíð Føroya fólks

Harry á Lakjuni

Tá ið tað nú um dagarnar verður fokuserað so nógv upp á fortíð løgmans, kundi eg hugsað mær at gjørt eina viðmerking - ikki til forsvar fyri løgmann ella nakran, ið kundi hugsast at havt eina »ivasama fortíð«. Heldur ikki ætli eg mær at grava í fortíðini hjá nøkrum.

Tjóðveldisflokkurin proklamerar stórt í hesum døgum, at teir á tingi eru garantar fyri politiskum reinføri, so í fortíðini hjá tingmanning Tjóðveldisfloksins er neyvan nakað at grava eftir, og tað eiga vit at gleðast um.

Og um so var, at onkur tjóðveldismaður onkuntíð, fyri 10, 20 ella 30 árum síðani, skuldi havt traðkað skeivt, og okkurt skuldi verið at farið eftir, so tænti tað neyvan nøkrum endamáli at rivið upp søk. »Tann, ið dylur misgerð, søkir kærleika, men tann, ið rívur upp søk, skilir vin frá vini.« (Orðt., 17.9)

Ein ivasom fortíð kann vera tyngjandi. Men ein ivasom fortíð er ikki so nógv at ræðast um ein ivasom nútíð, um kann føra til eina meir ivasama - fyri ikki at siga - óhugnaliga framtíð.

Tá ið eg sigi hetta, so hugsi eg um, at tjóðveldismenn í sama andadrátti, teir proklamera sítt reinføri, proklamera sín stuðul á tingi til bæði líkt og ólíkt - kanska mest ólíkt. Og tá ið eg sigi tað, so vita øll, sum hava lisið bløðini ta síðstu tíðina, hvat eg meini við. Eingin flokkur hevur sum Tjóðveldisflokkurin víst sín stuðul til slíkt, sum bæði er abnormt og óføroyskt.

Eg ræðist nógv verri eina framtíð við Tjóðveldisflokkinum enn fortíð løgmans.